## Húsarhaldsskúli Føroya søkir

# lærara (avloysara)

## Endurlýsing

Søkt verður eftir einum føðslu- og húsarhaldsfrøðingi at undirvísa fulla tíð í tíðarskeiðnum 1. august 2006 - 28. februar 2007.

**Søkt verður eftir lærara, sum**
- skal undirvísa í matgerð, kostlæru, vørukunnleika, reinføri o.ø.
- skal vera við til at fyriskipa ymisk tiltøk á skúlanum
- dugir at samstarva
- er fryntligur og fyrikomandi
- hevur áhuga í at arbeiða saman við ungdómi
- hevur hug at seta sín dám á skúlan

**Førleikakrøv**
Umsøkjarin skal hava útbúgving sum føðslu- og húsarhaldsfrøðingur ella líknandi útbúgving.

**Løn:**
Starvið verður lønt í lønarflokkunum 18,1-27,4 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag.

**Fyrispurningar**
Um tú ynskir fleiri upplýsingar um starvið, kanst tú venda tær til leiðarna á skúlanum Jóhannu á Tjaldarfløtti.

**Umsókn**
Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og CV skulu verða skúlanum í hendi í seinasta lagi 26. juni 2006.

**Húsarhaldsskúli Føroya**
Stoksoyrarvegur 29 · 700 Klaksvík
tlf. 456974/216974 · fax 457664
teldupostur: hsf@post.olivant.fo

# Hjálparfólk

## til teknisku deild hjá Tvøroyrar komunu

**er leyst at søkja til setan skjótast gjørligt.**

**Arbeiðsuppgávurnar verða m.a. hesar:**
- projektering
- at standa fyri og menna skráseting
- málsviðgerð
- dagføra byggisamtyktir og býarskipan
- avgreiða samtykt mál.

**Kommunan ynskir at tú:**
- hevur evni at arbeiða sjálvstøðugt
- hevur góðan telduførleika og dugir at brúka skrivi- og tekniforrit
- hevur góð samstarvsevnir, bæði munnliga og skrivliga
- dugir væl við viðskiftafólki.

**Lønar- og setanarviðurskifti**
- starvið er fulltíðarstarv og hevur tilvísing til leiðaran av teknisku deild
- starvið verður sett sambært sáttmála millum KAF og avvarðandi yrkisfelag.

Tvøroyrar kommuna skilar sær rætt til at velja millum umsóknirnar ella onga at taka.

Umsóknir saman við prógvum og cv verða at senda til:

**Tvøroyrar kommunu**
Tekniska nevnd
800 Tvøroyri

áðrenn 7. juli 2008.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Paula Einarsson á tlf. 371551 ella 210231.

**Tvøroyrar Kommuna**

**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

# Sjúkrarøktarfrøðingar og Heilsurøktarar til G4

Á **G4** verður søkt eftir sjúkrarøktarfrøðingum og heilsurøktarum til feriuavloysan í juli og august 2006. Eisini er møguleiki fyri tímaløntum vaktum eftir avtalu.

Deildin er ein kirurgisk seingjardeild við servitan innan ortopædi, maga/tarm og urologi. Vit hýsa eisini sjúklingum við almenn kirurgiskum, gynækologiskum, eyga, oyra, nøs og hálsasjúkum. Á deildini er pláss fyri 24 sjúklingum.

Nærri fæst at vita um størvini við at ringja til Elin Vitalis, deildarleiðara á G4, á telefon 304500 lokal 5064 ella Ceciliu Vestureið, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 5102 e-postur ceci@lsh.fo

Løn- og setanartreytir smb. sáttmálan millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.

Umsóknarfreistin er 30. juni 2006 kl. 12.00.
*Tað er umsøkjarans ábyrgd, at umsóknin er á Lønar- og starvsfólkadeildini áðrenn freistin er úti.*

Skrivlig umsókn í brævbjálva merktur »umsókn til starv« við CV, autorisatión, avrit av prógvum og viðmælum e.l. skal sendast til:

**Landssjúkrahúsið**
Lønar- og Starvsfólkadeildin
FO 100 Tórshavn

*Á heimasíðuni hjá Landssjúkrahúsinum www.lsh.fo sæst meira um størv við at klikka á leinkjuna "starvsfólk"*

## STÓR ENDARAÐHÚS Í HOYVÍK TIL SØLU



Stór endaraðhús á Torkilsgøtu 17 í Hoyvík verða hervið sett til sølu.
Húsini fevna um 104 m2 í stovuhædd og loft á 75 $m^2$, íalt 179 $m^2$. Grundøkið er 247 $m^2$.

Stovuhæddin er innrættað við 2 kømrum, 1 hjúnarrúm við altanhurð, baðirúm, køkur og stova, rúmligt vaskirúm/fýrrúm, durur og stór gongd. Loftshæddin er óinnrættað.

Umhvørvið er sera barnavinarligt og friðarligt.

Sí www.hafoss.com fyri at síggja myndir og fáa fleiri upplýsingar um húsið.

***Áhugað kunnu ringja á tlf. 520014.***

# Dagrøktari til dagrøktina á Skála

Runavíkar Kommuna søkir eftir dagrøktara at byrja 14. august.

Viðkomandi skal hava áhuga og hegni at arbeiða við børnum.

Dagrøktarheimið skal vera soleiðis innrættað, at tað er gott og trygt at spæla innan- og uttandura.

Nærri upplýsingar viðvíkjandi starvinum fáast við at venda sær til dagrøktarleiðaran á tlf. 442059 ella 586004.

Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi seinast mikudagin 28. juni 2006.

**Runavíkar Kommuna**
Sosiala deild
Heiðavegur 26
FO-600 Saltangará



## TIL SØLU ELLA LEIGU



Um hóskandi boð fæst selja vit sethús okkara við Grønlandsvegin 42 í Tórshavn.

Øll húsini eru innrættaði og væl hildin.
Húsini liggja sera væl fyri.

Umhvørvið er veðurgott, friðarligt og stutt er oman í miðbýðin.

***meira fæst at vita á***
**tlf 22 80 90 ella jpj@nordcar.fo**